# Á TÓRSVØLLI

Uni Arge

Onkur prædikumaður bað inniliga til Várharra um, at mjørki, ódnarveður og kanska eisini øska úr onkrum jøkli skuldi leggja flogferðsluna lamna, so Elton John ikki fekk lent í Vágum. Tá flogfarið við bretska sangaranum nærkaðist Føroyum, sást ikki ein mjørkaflóki nakrastaðni, svávulrok var onki, og sólin stóð hægst á himni. Várharra setti sum vant ongan eftir, og Elton John kom tíbetur til Føroya í øllum góðum.

Eini 6.000 fólk vóru komin saman á Tórsvølli at síggja mannin spæla, sum fyrstu ferð steig á altjóða tónleikapallin í 1970, og sum í somu løtu fekk viðurkenning frá teimum, sum í átta ár frammanundan høvdu kollvelt popptónleikin. John Lennon segði í 1970, tá The Beatles vóru givnir, at tað einasta nýggja ljóðið, ið veruliga segði honum nakað, var ljóðið hjá Elton John, tá hann sang "Your Song."

Hansara meting var rættiliga neyv, tí á Tórsvølli kl. 21.30 í 2010 hevði "Your Song" hjá Elton John somu gandakendu ávirkan á áhoyrararnar sum 40 ár frammanundan. "Tú kanst siga við øll, at hesin sangurin er til tín," sigur Bernie Taupin í "Your Song," og orðini fingu ikki sørt av kraft, tá hugsað varð í huga, hvussu summi gjørdu sær fyri skommum undan konsertini og vónaðu, at onki pláss var til Elton John í Føroyum.

## Maðurin og klaverið

Elton John kom til Føroya at syngja og spæla klaver. Ongin guitaristur var við honum, ongar trummur vóru á pallinum, og ongir kórsangarar hjálptu honum. Av og á hoyrdust nakrir strúkarar, ið løgdu seg aftrat røddini og klaverinum og góvu ljóðmyndini fyllu. Summi hildu strúkararnar vera sukursøtar, men yvirhøvur var tað í lagi, at einsamalli maðurin við væl ljómandi klaverið av og á fekk ósjónligt fylgispæl úr hátalarunum.

Ein vanligan týsdag, tá tú fert av húsum at lurta eftir Elton John, hugsar tú ikki so gjølla um, hvat er í væntu. Tú veitst bara, at tann mannin mást tú hoyra. Tá tú so stendur á Tórsvølli hálvsentimentalur og bíðar eftir elefantinum, og hann brádliga trínur fram á torg, savnast øll tónleikasøgan í einum klumpi í tínum brósti, og tú skilir, at garpurin, sum alt lívið fylti títt høvd við tónleikaligum klassikarum, sanniliga stendur mitt í tínum heimbýi.

Í sjálvum sær er tað nóg stórt. Pallurin kann vera svartur ella grønur, og hann kann venda suðureftir ella eystureftir. Alt sovorðið er líkamikið, tá høvuðspersónurin hevur selt 250 milliónir plátur og ongantíð er dottin av altjóða tónatindinum í 40 ár. Sjálvur segði Elton John, tá hann var komin á pallin, at hann hevði aldrin trúð, at hann skuldi spæla í einum landi sum Føroyum. Men har setti hann seg so á sín eyðkenda hátt handan klaverið við einum stórum smíli.

## Røddin og spælið

Elton John eigur so nógvar klassikarar at rista úr ermuni, at hann kann altíð fáa fólk at syngja við á eini konsert. Sangir sum "Daniel," "Nikita" og "Rocket Man" eru heimshitt, ið øll kenna. Sjálvur havi eg ongantíð av álvara sveimað fyri sangum sum hesum hjá Elton John. Teir byrja væl og ljóða væl, men onkursvegna eru teir ov eins allan vegin. Tá dámar mær betur "Your Song," Goodbye Yellow Brick Road" og "Sorry Seems To Be The Hardest Word." Teir fara undir húðina.

Á Tórsvølli var ein sangur sum "Rocket Man" tó ein stór uppliving, tí í honum vísti Elton John síni framúr góðu evnir sum klaverboksari. Hann er so rútmiskur og uppfinnsamur á tangentunum, at tú kanst ikki annað enn undrast, tá hann flýgur avstað, og sum sangari er hann framvegis øgiligur. Fáur í heiminum stendur Elton John kurl, tá hann hann av álvara rullar seg út framman fyri mikrofonini. Røddin er rock 'n' roll, klokkuklár og kraftmikil sum brim ein ódnardag, og á Tórsvølli viknaði hon ongantíð. Hon bara mentist.

Spurnningurin er, um onkur hevði tutlað Elton John í oyrað, at hann var fordømdur, áðrenn hann steig á land í Vágum. Áðrenn hann spældi "The Ballad of the Boy in the Red Shoes," kunngjørdi hann, at sangurin var um ein dansara í New York, sum fyrst í áttatiárunum doyði av AIDS. Stjórnin hjá Ronald Reagan gjørdi onki við sjúkuna, ið júst tá var komin undan kavi, og tað var stór skomm, kunngjørdi Elton John opinskáraður undir føroysku summarsólini.

## Áskoðarar reistust

Annars segði hann ikki nógv í mikrofonina. Var ikki yvirstreymandi lukkuligur um at síggja okkum øll og rósti ikki føroysku náttúruni meira enn enn einaferð, og tá meinti hann tað. Hann leveraði sína vøru á professionellan hátt. Spældi fyrst ókendar sangir, og tann fyrsti heilt kendi sangurin var "Daniel." Síðan kom "Don't Let the Sun Go Down On Me," og tá sungu fólk við. Og so komu teir allir, "Rocket Man," "I Guess That's Why They Call It the Blues," "Sacrifice," "Someone Saved My Life Tonight," "Nikita" og "Candle In The Wind."

Onkur nýggjur sangur var eisini á skránni. "You're Never To Old To Hold Somebody," ið kemur út seinni í ár, minti áhoyrarafjøldina á, at maðurin á pallinum er ikki heilt ungur longur. Í mars fylti hann 63 ár, og um hann gavst at spæla í morgin, hevði tað ongan mun gjørt fyri hansara eftirmæli. Hann hevði farið í søguna sum ein tann best umtókti tónleikarin nakrantíð. Men Elton John hevur framvegis nógv at geva heiminum. Spælið og røddin eru topptunað, hugurin tykist vera góður, og fólki dámar hann.

Ímóti endanum á konsertini sang hann "I'm Still Standing." Tá reistu øll á áskoðaraplássunum seg fyri poppkonginum, og hesa flottu sjón hevði hann hjartaliga uppiborið aftur fyri eina frálíka konsert og eina legendariska karrieru. Eina tøkk hevur Five Star Entertainment eisini uppiborið fyri at gera føroyska summarið ríkari við heimsnøvnum sum Bryan Adams og Elton John. Nú fer at líða væl, at Paul McCartney og Rolling Stones fara at duna millum húsini í Havn.

UNIARGE@GMAIL.COM





Hjørdis Maria, Ísland

*- Nú fari eg beint heim at taka allar mínar gomlu Elton John-fløgur fram aftur. Konsertin var sera góð.*



Annleyg Sámalsdóttir, Vestmanna

*- Eg eri gamal Elton-fjeppari, so mær dámdi væl. Teir fystu sangirnar hevði eg ikki hoyrt fyrr. Favoritturin má nokk sigast vera "Your song".*



Maibritt, Tórhild, Jóhanna Maria og Eilif, Langasandur

*- Konsertin var ótrúliga góð. "Your song" var bestur.*



MC Restorff, Havn

*- Elton John havi eg hoyrt, líka síðani eg var lítil, og nú tá hann var her við føturnar á okkum í Føroyum, helt eg, at eg skuldi fara og lurta. Vit gjalda jú nógvan pening fyri at fara til London á konsertir. Hann dugir sera væl.*

Lagt til rættis: Inna Tørnroos